# H71

Faldari 4

ATLANTIC AIRWAYS KAPPINGIN

# H71 - VÍF

Sunnudagin 16. november kl. 16.00

Hoyvíkshøllin



BÓNUS -er biligari!
J&K
SUÐUROYAR SPARIKASSI
Advokatfelagið Yviri við Strond
TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR - so ert tú tryggari
P/F THOMAS DAM ÍTRÓTTARDEILDIN · N. Finsensgota 5 · Tel. 31 14 03
polytan

↘ trygging.fo




Tú fært avsláttur av inngjaldinum til tínar privatu tryggingar hjá Tryggingarfelagnum Føroyum, um tú hevur tvær ella fleiri privatar tryggingar hjá okkum. Fleiri tryggingar tú hevur, størri avsláttur fært tú.

Hevur tú inngjald til Betri pensjón á minst 10.800 krónur árliga, fært tú 20% í avsláttri av tínum privatu tryggingum hjá Tryggingarfelagnum Føroyum, líkamikið um tú hevur 1, 2, 3, 4 ella fleiri privatar tryggingar.

**Tilsamans kanst tú fáa heilt upp til 32% í avsláttri**

*Set teg í samband við okkum á telefon 345600 ella tf@trygging.fo og fá eitt tilboð uppá tryggingar og pensjón.*

Betri pensjón TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR




# Frítíðin byrjar umborð

Lætt og ómakaleyst ber til at koyra bæði Danmark, Ísland og alt Evropa upp og niður, júst tá passar tær. Við egnum bili er alt nógv lættari. Pakka viðførið í bilin, koyr umborð og njót ferðina.

Tá tú ferðast við Norrönu, kanst tú byrja at halda frí, leingi áðrenn tú kemur fram til títt frítíðarstað ella summarhús. Umborð á Norrönu kanst tú halda frí, so tað stendur eftirí.

Les meira á **www.smyrilline.fo**, skriva til **booking@smyrilline.fo** ella ring **345900**

# H71 ER STØRSTA **HONDBÓLTSFELAG** Í FØROYUM!



**VIT KUNNU NÚ STAÐFESTA, AT H71 ER OG HEVUR SEINASTU 3 ÁRINI VERIÐ STØRSTA HONDBÓLTSFELAG Í LANDINUM. HETTA VÍSIR YVIRLITIÐ YVIR TILMELDAÐ LIÐ TIL FM KAPPINGINA, SUM VIT HAVA FINGIÐ HENDUR Á. TALVAN NIÐANFYRI VÍSIR BROYTINGARNAR Í TILMELDINGINI SEINASTU 3 KAPPINGARÁRINI.**




Sum sæst á talvuni, so eru H71 og EB einastu liðini, sum hava havt framgongd í talinum av liðum hesi seinastu 3 árini. Vi kunnu til stuttleika nevna, at kappingarárið 2000/2001 hevði H71 bert 15 lið við í kappingini, meðan Neistin hevði 32 lið, Kyndil 23 lið, STÍF 17 lið og Tjaldur 17 lið. Tvs. at vit tá vóru fimt største felag í landinum, og tá vóru tilsamans 166 lið við í kappingini.

Søguligani sæð, so byrjaði hondbólturin ikki av álvara í Hoyvík fyrr enn í seinnu helvt av 70'árunum, og vann H71 fyrstu FM-heitini í 1983. Tað árið vunnu bæði dr. 16 og dr. 12 gull í FM. Minnist væl, at fyrsti dysturin vit spældu var ímóti Kyndil, vit taptu 29-0. Næsti dysturin var móti Neistanum og hann endaði 24-3 til Neistan, og tá vóru vit sera glaðir *(minnist, at eg hevði eitt skot á stongina)*. Nógv vatn er runnið í hoydalsá síðani tá, og úrslitini hava verið misjøvn. Frá stórtíðini við Gerster, seinast í áttatiárunum til nærum avtøku av felagnum í nítiárunum. Hetta er nú alt partur av søguni og sanniliga eisini partur av samleikanum, serliga hjá okkum „gomlu" úr Hoyvík, sum hava verið við frá byrjan.

Hoyvíkin er nógv broytt seinastu árini, og er grundarlagið fyri tilfeinginum hjá H71 somuleiðis styrkt við rúkandi ferð. Fólkatalið í Hoyvík er beint nú 3760 íbúgvar, og skal tað samanberast við, tá ið felagið bleiv stovnað, so vóru tað ikki meiri enn uml. 80 íbúgvar í Hoyvík. At Hoyvíkin er vaksin so „kolosalt" hevur sínar natúrligu orsøkir við stóra upplandinum í Hoyvíkshaganum, men eitt er at vaksa, annað er at herberga allari hesari massivu innrásini av tilflytarum. At trivnaðurin millum fólk í Hoyvík er góður og ungdómurin í stóran mun velur hondboltin fram um onnur frítíðarítriv, kunnu vit takka øllum teimum nógvu, sum eru góð við felagið og sum ikki eru bangin fyri, at taka eina hond í, tá tað krevst. Men største heiðurin fyri, at framgongdin er so markant tey seinast 10 -15 árini eigur nevnd felagsins, sum hevur stýrt felagnum við hepnari hond. Við miðvísum og málrættaðum arbeiði, serliga millum børn og ung, er eydnast at menna hondbóltin í Hoyvík soleiðis, at vit eru før fyri at seta við nýggjar og evnaríkar leikarar á okkara besta manslið ár um ár. Enn írestar nakað á kvinnusíðuni, men við trimum góðum gentum 17 liðum í ár, hava vit góðar vónir um, at vit eisini fara at hava eitt gott kvinnulið um stutta tíð.

Hetta hondbóltsárið er nú komið rættiliga ígongd, og vit kunnu ikki klaga um úrslitini higartil. Tað er hilnast so mikið væl, at vit nú sunnudagin tann 15. nov. fara at kappast við teir gulu úr hondbóltsbygdini Vestmanna um fremsta plássið í AA deildini.

*Gunnar Djurhuus*







Lundin Financials
Lundin Løn
Microsoft Dynamics
Trygg
fíggjarstýring
NEMA


NordikSOLO 18+
Kom best frá byrjan við NordikSolo
Ert tú millum 18 og 28 ár, kanst tú gerast NordikSolo kundi og fáa eina rúgvu av ókeypis tænastum og serliga góðum rentum.
Vitja www.banknordik.fo/solo og gerst NordikSolo kundi.
BANKNORDIK


Tað besta omaná
Forkela familjuna. Royn okkara leskiliga vaniljukrem.
VANILJU
KREM
Nýggj vøra!
MBM


Pf. Jógvan Weihe
P/F Jógvan Weihe | Tel: 35 38 97 | Fax: 35 38 98
www.weihe.fo | weihe@weihe.fo

P/F Hjá Fróða

Jónas Broncksgøta 25
Tel 35 09 00
Fax 35 09 01
frodi@hjafroda.fo

Flügger









fk







# vistir.fo
haraldsen

Fá tær
**Familju ískoyti**
Ring **202020** ella skriva til
**vodafone@vodafone.fo**



# Familju ískoyti til Vodafone RED

**fyri hvørt barnið**

**29,-** kr./mðr.

✓ **Frí tala**
✓ **Frí sms**
í familjuni

Við Familju ískoyti til Vodafone RED kunnu tit tosa og sms'a frítt í familjuni fyri einans **kr. 29,-** fyri hvørt barnið.

So kunnu tit kenna tykkum **trygg**, at tykkara barn fær samband við tykkum, eisini, tá ið eingin talutíð er á.

Les meira um familju ískoyti á **vodafone.fo**

# Kaj Andreasen & Co
**Handilin við tí fjølbroytta úrvalinum**



**TIT HAVA TØRVIN**
**VIT ERU VEITARIN.**

Handilin við tí fjølbroytta úrvalinum.

Atlas Copco Quality

Atlas Copco

**www.andreasen.fo**

**facebook.com/Kaj.Andreasen.Co**

# TÚ SKALT BRÚKA NÓGVA TÍÐ UPPÁ TAÐ, SUM TÚ VERULIGA VILT



**SUM 16 ÁRA GAMAL FLUTTI JÓHAN Á PLÓGV TIL DANMARKAR FYRI AT FYLGJA SÍNUM DREYMI – AT GERAST PROFESSIONELLUR HONDBÓLTSSPÆLARI. OG Í DAG SPÆLIR HANN Í BESTU DEILDINI Í DANMARK OG ER UPPTIKIN Á U21 LANDSLIÐSHÓPIN.**

## DANMARK KALLAR

Mamma Jóhan er Aibritt á Plógv. Hon var bæði errin og stúrin, tá ið sonurin sum 15-ára gamal kom heim og kunngjørdi, at hann hevði fingið møguleika at fara til Danmarkar at spæla. Aibritt hevði ætlað at hava yngstabarnið í reiðrinum í nøkur ár afturat, men soleiðis skuldi ikki verða, tí tað gekk ikki long tíð, áðrenn Jóhan, sum tá var fyltur 16, møtti til royndarvenjing hjá Skanderborg.

– Eg var glað hansara vegna, tí hann hevur altíð verið ítróttarmaður. Tá hann fekk tilboð um at fara til Danmarkar at spæla hondbólt, var hann eisini á U17 landsliðnum í fótbólti. Hann næstan búði í Gundadali, og vit vistu, at tað var ítrótt, hann vildi. Hann hevur altíð elskað at venja, so harða venjingin er ikki nøkur byrða. Jóhan livir fyri hondbóltin, og hann offrar alt annað. Hann livir sunt, og hann hvørki drekkur ella gongur í býnum, fortelur Aibritt.

## SHEA – TILBOÐ TIL ÚRMÆLINGAR

Jóhan var ein av teimum fáu dreingjunum, sum fekk pláss í SHEA - Skanderborg Håndbold Elite Akademi. SHEA er menningartilboð til úrmælingar innan hondbólt, sum hava evni til seinni at mennast til LIGA-spælarar, ella spælarar í bestu donsku deildini.

SHEA er tengt at Skanderborg hondbóltsfelagi, og teir fáu, sum hvørt ár sleppa framat, búgva eisini á akademinum, har vaksin fólk hava ábyrgd av, at dreingirnir fáa rættan kost og annars búleikast í tryggum umstøðum. Hetta sissaði mammuna, sum fekk vissu um, at ungi sonurin var í góðum hondum í Danmark.

Jóhan byrjaði beinanvegin á U16 og seinni á U18 liðnum hjá Skanderborg Håndbold. Meðan hann vandi, tók hann 10. flokk og hægri handilskúla, sum hann var liðugur við í summar. Hann býr nú saman við unnustuni Astrid í Skanderborg, har hann hevur tikið eitt sabbatsár frá skúlanum. Hann arbeiðir sum vikarur á einum skúla nakrar tímar hvønn dag, meðan hann venur 4 tímar hvørt kvøld. Dystirnir eru sum oftast mikukvøld og í vikuskiftunum.

Longu sum U18 spælari var Jóhan tikin við til dystir hjá liga-liðnum og í fjør undirskrivaði hann ein 3 ára sáttmála við ligaliðið, har hann síðani hevur verið fastur leikari.

Umframt at spæla í bestu donsku deildini er Jóhan eisini úttikin til danska U21 landsliðið. Um hann sleppur á liðið, skal hann við danska U21 landsliðnum til heimsmeistaraskapið í hondbólti, sum verður í Brasiliu á sumri 2015.

## ÚR KYNDLI Í LIGUNA

Jóhan hevur spælt hondbólt við Kyndli, síðani hann var 4 ára gamal. Men broytingin frá at vera ein vanligur hondbóltsspælari í Føroyum til at spæla í bestu donsku deildini var ógvuslig. Tað var ikki lætt at koma til Skanderborg, har venjingin hevur til endamáls at menna ungu leikararnar til at spæla hondbólt á hægsta stigi. Og nógv verður gjørt burturúr; umframt hondbóltsvenjarar gera bæði fysioterapeutar, kostráðgevar, styrkivenjarar og onnur fakfólk teirra besta fyri, at dreingirnir skulu náa upp á hondbóltstindarnar. – Venjingin var og er hørð. Hetta merkti eg beinanvegin, tá eg kom til Skanderborg, sigur Jóhan.

*framhald á síðu 25*

– Eg kendi meg sum eina 18 ára gamla … og ØLL vóru har

– OMG … náttin fleyg avstað

Hetta søgdu fólk farna ár:

# 80'ini UMAFTUR

– Deiligt, at har eisini vóru menn

– Eg dansaði ALLA náttina



BOOKIÐ BARNAGENTUNA LONGU NÚ TIL HIN 21. FEBRUAR! TÍ TÁ VERÐA 80-INI UMAFTUR! Í HOYVÍKSHØLL Á TRIÐJA SINNI. OG VIT GLEÐA OKKUM ALMIKIÐ. DYRNAR LATA UPP KL. 23. OG VIÐ EITT LJÓMA 80-ARAHITTINI OG TÚ SÆR DISKOKÚLUR, KREPT HÁR OG GLAÐ FÓLK, SUM EISINI VÓRU Í DALLAS, HØLIÐ, GLYVRA BIO OG ALBERT HALL, TÁ TÚ VART HAR. SHOWMENN OG PLÁTUVENDARIR GEVA OKKUM EINA FRAMÚR BREIÐA OG NOSTALGISKA TÓNLEIKAUPPLIVING.

**Hvør minnist ikki:** *Opus, Life is Life – AHA, Take on me – Modern Talking, Cherry Cherry Lady – Madonna, La is La Bonita* og allar hinir sangirnir, sum geva okkum flash back til 80-ini við wunderbaumjólatrøum, neon, Jane Helen gele og kasettubandupptakara og plátuspælara?

Vit í H71 ynskja at skapa karmarnar og geva tær eitt stuttligt, hugnaligt og nostalgiskt kvøld sum far teg at minnast aftur á góðar løtur í 80-unum.

Vit fegnast um, at undirtøkan hevur verið so avbera góð til hetta tiltak. Tá vit fóru undir fyrireikingarnar á fyrsta sinni vóru vit heldur fjálturstungin: Mundu fólk vera við upp á eitt 80-arakvøld? Fór undirtøkan at verða nóg góð? Vóru fólk við upp á alment dansitiltak í Hoyvíkshøll?

Fyrsta árið var útselt á midnátt, tað kvøldið tiltakið var og í fjør var útselt tvær vikur undan tiltakinum. So best er at bera seg skjótt at. **Tí tá útselt er – er útselt!**



## JÓLAGÁVUHUGSKOT?

*Til ber at ogna sær atgongumerkini longu í desember – lýst verður nær og hvar atgongumerkini verða til sølu. Men, um tú vil ogna tær eitt atgongumerki ella kanska keypa onkrum 80-arafjeppara eitt atgongumerki í jólagávu, so verður tað lagamanni. Vit venda aftur*




**Í SEINASTA FALDARA HØVDU VIT GREIN UM TAÐ AT FARA Á EFTIRSKÚLA. Í HEYSTFRÍTÍÐINI VÓRU RASMUS OG LASSE, SUM HAVA VERIÐ Í VIBORG SPORTS COLLEGE SAMAN VIÐ FLEIRI ØÐRUM FØROYSKUM HONDBÓLTSSPÆLARUM OG VITJAÐU VINIR SÍNAR Í FØROYUM. TEIR VITJAÐU EISINI FYRRVERANDI VENJARA SÍN MARK, SUM NÚ ER HØVUÐSUNGDÓMSVENJARI HJÁ H71.**

Lasse og Rasmus fingu møguleikan at síggja Mark spæla við besta liðnum hjá H71 móti Kyndil. Ein sera spennandi dystur sum Mark hevði sína avgjørda leiklut í at vit vunnu. Rasmus og Lasse hava sent okkum hesar reglurnar um H71 og um dystin.

### LASSE HØGHOLM PEDERSEN OG RASMUS SECHER ELDRUP:

H71 er en rigtig dejlig klub, med rigtig mange gæstfrie og venlige mennesker. Vi var til kampen mellem H71 og Kyndil på hjemmebane. Vi oplevede udover god håndbold fra hjemmeholdet, en masse tilskuere som nærmest gik lige så meget op i kampen som spillerne på banen. Det var sjovt og spændende at være en del, af en meget spændende og hårdt spillende kamp. Vi var meget overrasket over det fysiske niveau hos samtlige spillere, og der blev virkelig gået til stålet. Kampen endte med en 1 måls sejr til hjemmeholdet, og det skulle jo selvfølgelig fejres, vi havde en rigtig god aften med drengene fra holdet og vi følte os nærmest som en del af klubben. Alt i alt er vi meget imponeret over den håndboldkulturen på Færøerne, måske en dag det kunne blive os på banen for H71.

Med tanke på at der bor ca. 50.000 på Færøerne, så var vi ret imponerede over niveauet. Både niveauet på seniorholdene, men også niveauet på de H71 ungdomshold vi så. Vi har haft lidt svært ved at sammenligne det færøske niveau med niveauet i Danmark, fordi det er to forskellige spillestile. På Færøerne giver dommerne lov til hårdere tacklinger end i Danmark, og derfor bruger man fysisk stærkere spillere. I Danmark spiller man en anelse hurtigere, men har derimod ikke lige så fysisk stærke spillere. Vi kom frem til at H71's 1. Hold, nok ville kunne spille i 2. Division i Danmark. Vi snakkede derudover også om at de sandsynligvis ville vinde mange kampe i Danmark på deres vilje og engagement.

# HIN ELEKTRISKI STÓLURIN




**Hvørjum plássi spælur tú á?**
Strikuspælari

**Hvør AA-leikari heldur tú er løgnastur?**
T-pain (Tróndur Arge)

**Dovnastur?**
Pætur Thomsen

**Størsta „drama queen"-in?**
Bogi og Jesper eru tættir kandidatar

**Hevur flottastu reyv?**
Djóni Vest, nú Tóraldur er farin

**Brúkar longst tíð frammanfyri speglinum?**
Ein av danskarunum, ein nýtir tíðina til hárið, og hin klárar ikki at seta linsur í eyguni.

**Hvat er tín størsta/besta hondbóltsupliving?**
Em undankapping í Ísrael við u20 landsliðnum

**Top 3 mest spældu sangirnir á telefonini/ipoddinum hjá tær?**
Neil Young – Old man, Arctic Monkeys fløgan er eisini spæld ofta í bilinum.

**Nær fekst tú tín fyrsta muss?**
Tað má vera áðrenn eg gjørdist við vit og skil.

**Vaskar tú tíni egnu venjingarlæðir?**
Tað ger mín sambúgvi, Mark Marcher.

**Hvønn persón samanberur tú teg onkuntíð við – í allari hemmeligheit?**
Mær dámar at samanbera meg við vinmannin Andor, tí eg havi líka gott vinstrabein í fótbólti.

**Skoraði tú fleiri mál í tínum seinasta dystið, enn tú hevur skorað damur í tínum lívið?**
Man skal siga ja, ha?

**Hvat er títt yndlings #hashtag?**
#Handball

**Hvat ger H71 til besta hondbóltsfelag í Føroyum?**
Fólkið í og rundanum felagið, vælkoyrandi maskina.

**Hevur tú nakra flóvisliga hondbóltsøgu at fortelja?**
Tað má vera tá vit spældu ímóti neistanum (dreingir 12 ella 14) og onkur rópti: „Verji Jesus!" Hetta kom sjálvandi av at eg hevði langt hár, sum neistadreingirnir samanbóru við hárið á Jesusi sjálvum.

J&K

ÆTLAR TÚ AT STOYPA?

Tosa fyrst við okkum.

Framkomna, teldustýrda betong-blandiskipanin syrgir fyri, at tú kanst vera heilt vísur í, at tú fært betong av allarbestu góðsku bæði til nýtslu á landi og undir vatni
Blandi- og pumpubilar okkara bera so í bandi, at útkoyring og fylling í formar v.m. ikki er nakar trupulleiki - heldur ikki um tvørligt er at sleppa framat.

Vit koyra um alt landið og eru kappingarførir í prísi!



J&K

J & K Betong

á Hjalla | Postboks 3179 | FO-110 Tórshavn | tel 31 50 60 | fax 31 41 94 | e-mail: jkp@jkp.fo | www.jkp.fo
Blandimeistarin tel 58 50 25




Grannskoðan // Ráðgeving // Bókhald // Roknskapur

Skalt tú meta
um framtíðina
mást tú
kenna fortíðina

Januar
LØGGILT GRANNSKOÐANARVIRKI

WWW.JANUAR.FO

SENDISTOVAN



# Takk fyri at tú stuðlar Javna

## Gerst limur í Javna

Far inn á okkara heimasíðu www.javni.fo, trýst á leinkjuna „Tekna teg sum lim“ og fylg vegleiðingini.

Hevur tú brúk fyri hjálp í sambandi við tilmeldingina, ring so til Javna á telefon 208090 ella 514827.

## Gerst stuðul hjá Javna

Ynskir tú at stuðla okkum við einari fastari upphædd hvønn mánað, far inn á heimasíðuna www.javni.fo og trýst á leinkjuna „Stuðulsgjald“ og fylg vegleiðingini.

Hevur tú brúk fyri hjálp í sambandi við tilmeldingina, ring so til Javna á telefon 208090 ella 514827.

javni
Hoydalsvegur 40/Loftið
FO-100 Tórshavn
Tel +298 20 80 90
javni@javni.fo
www.javni.fo



polytan®
simonsen@polytan.dk
tlf: 0045 39405420
far: 0045 26745420
polytan ligaturf 240/el-25
FIFA 2 stjørnu góðkent




Stílurin er tín, næstan alt ber til. Folia fæst í øllum litum og kann skerast út til búmerki, myndir ella tekst. Bilurin á myndini hevur carbon foliu á takinum og síðuspeglunum.

**Føroyaprent**
Tel. 31 45 55 www.foroyaprent.fo



**VIT GERA ALT BLIKK- OG RØRARBEIÐI**

*Alt til HITA SANITET & VENTILATIÓN*

**Maria Poulsen & Co**
Smyrilsvegur 8 Postboks 182 FR-100 Tórshavn Tlf. 312000




**MEGA**
WWW.FACEBOOK.COM/MEGA.SMS
**OUTFITTERS NATION**

www.torshavn.fo



Skapandi, mennandi, kveikjandi

TÓRSHAVNAR KOMMUNA




Netbankin Tablet er komin

Eik Banki P/F
Tel. 348000

www.eik.fo

"Netbankin Tablet gevur mær frælsi og tíð til at gera tað,
sum eg havi bestan hug til."
– Bjørk Herup Olsen, rennari

Avgreið tíni fíggjarligu viðurskifti - uttan mun til tíð og stað. Netbankin Tablet er tann sami sum netbankin á telduni, uttan nakrar fáar funkur.

Netbankin Tablet riggar við iPad og Android teldlum, og er ókeypis at stovna og hava.

framhald av síðu 13

**LÆRIR AV ØÐRUM**

Hevur liga- og landsliðsspælarin nøkur góð ráð til føroysk børn og ung, sum droyma um at fara allan vegin? – Tað snýr seg um at brúka tíð uppá tað, sum tú veruliga vilt. Tú skalt brúka nógva tíð í høllini, og tú skalt hyggja eftir og læra av, hvussu onnur gera. Eg eri vongur, og eg hyggi eftir, hvussu onnur gera til dømis skrúvu-bóltar. Uppá tann mátan læri eg tað, sum hinir spælararnir duga væl. Og frá 16-ára aldri er styrkivenjing vigtig, sigur Jóhan.

**KOSTURIN**

Jú eldri Jóhan er blivin, jú meira ger hann burturúr at røkka teimum bestu úrslitunum. Hetta merkir eisini, at hann er tilvitaður um at eta rættan kost. Jóhan er noyddur til at ansa eftir, hvat hann etur, og maturin dagin fyri ein dyst hevur alt at siga. – Eg merki væl mun, um eg havi verið á McDonalds og etið burgara dagin fyri ein dyst. Tá orki eg nógv minni, enn um eg havi etið rættan mat. Og rættur matur aftaná styrkivenjing er eisini ótrúliga viktigur, fortelur Jóhan.

Er hann ongantíð freistaður? Áh jú meira enn so. – Eg kann ikki eta bomm og ljóst breyð hvønn dag, men onkuntíð eti eg sjálvandi alt tað ósunna. Alt eftir hvussu nógvar dystir eg skal spæla, eti eg slikkarí okkurt um eina ferð um vikuna, sigur Jóhan.

**AT SPÆLA MÓTI STJØRNUNUM**

Í dag spælir Jóhan á Plógv hondbólt í bestu donsku deildini, og hvørja viku brestur hann saman við fremstu hondbóltsspælarunum í Danmark, spælarar, sum allan hansara barndóm vóru hansara størstu stjørnur og fyrimyndir. – Eg hugsi ikki um tað, meðan eg eri mitt í tí, men nú møti eg ofta teimum spælarum, sum eg havi sæð í sjónvarpinum, frá eg var lítil. Nú spæli eg ímóti teimum og skori. Tað er spennandi og stuttligt, fortelur Jóhan.

Jóhan verður ofta spurdur, um hann nakrantíð flytur aftur til Føroya. – Tað er ringt at siga. Eg sakni Føroyar, men enn kann eg ikki siga, hvar eg endi. Eg hopi, at eg komi á bestu liðini í Danmark, og mín størsti dreymur er at sleppa at spæla hondbólt við einum av bestu liðunum í Týsklandi, Frankaríki ella Spanien, sigur Jóhan á Plógv.

**HVØR?**

Jóhan á Plógv, sum er føddur í 1994, er uppvaksin í Havn. Hann er yngstur av 3 systkjum, og foreldrini eru Aibritt á Plógv úr Sandavági og Jákup Egholm Hansen úr Sørvági.



*Jóhan á Plógv saman við foreldrunum Aibritt á Plógv og Jákup Egholm Hansen.*













# ÁRSINS FYRSTA U8 KAPPING – Í HOYVÍKSHØLL

**LEYGARDAGIN 1. NOVEMBER VÓRU VIT Í H71 VERTIR FYRI ÁRSINS FYRSTU U8 KAPPING. TALAN ER UM HUGALIGA, AFTURVENDANDI KAPPING, SUM HSF SKIPAR FYRI SAMAN VIÐ FELØGUNUM UM LANDIÐ. ENDAMÁLIÐ VIÐ KAPPINGUNUM ER, AT BØRNINI LÆRA AT SPÆLA HONDBÓLT, FINNA GLEÐINA Í SPÆLINUM OG AT FELØGINI Á HENDAN HÁTT EISINI REKRUTERA LEIKARAR.**

Liðini tekna seg hjá HSF, sum ger eitt yvirlit yvir, hvør dystast ímóti hvørjum. Liðini spæla 7 minuttir hvønn vegin og vøllurin verður deildur upp í tríggjar vallir.

Vit eru væl nøgd við dagin. Serliga, tí at luttakararnir vóru so ágrýtnir og tendraðir. Kýttu seg og koyrdu á. Tuskaðu aftur og fram á vøllinum ... Ongantíð var nøl.

Hetta var fyrsta kappingin hjá nógvum leikarum. Eyðsæð, at tey vóru sera spent. Eisini foreldrini vóru spent, sótu sum kveikjandi fjepparar á síðulinjuni.

Byrjað var klokkan níggju stundisliga – og níggju tímar seinni var kappingin av. Tá høvdu tveir gentubólkar og fýra dreingjabólkar dystast. Tilsamans eini 200 leikarar. Hugaligt.

## HVØR GER HVAT?

U8 Kappingin er skipað á hendan hátt. HSF ger yvirlit og tekur ímóti tilmeldingum og harumframt hevur HSF orðað nakrar einkultar mannagongdir, sum skulu lesast upp millum ímillum hvørt bólkaspæl. Tað serstaka við hesum sonevnda totalhondbólti er, at tað verður fokusera upp á, hvat leikarin kann og hevur møguleika til, heldur enn hvat er forboðið. Hetta tóktist at geva leikarunum eina góða uppliving. *Sí hsf.fo*

Vertsfelagið má hava fólk at rópa upp í mikrofon, hvør spælir hvar, deila vøllin upp í trý og ikki er verri, um ein drekkamuður fæst. Leikarar við familju koma jú úr øllum landinum. Foreldrini hjá U8 vóru sera beinasom at hava toast, frukt, grønmeti og køku við, sum vit fingu selt við søludisk okkara. Ungar gentur, sum leika við H71 vóru raskar og arbeiðssamar at selja við søludisk okkara og halda „skil á" spælitíðini og geva boð til leikararnar umvegis mikrofonina.

Samanumtikið enn ein hugaligur og hugnaligur leygardagur í Hoyvíkshøll – leikarum, foreldrum og hjálparum at takka. Og rós til HSF eisini.



# UPPBOÐSSØLA

**FORVITNISLIGT ÁTAK FER AV BAKKASTOKKI NÆSTA SUNNUDAG Í HOYVÍKSHØLLINI. TAÐ ER H71-STUÐLAR, SUM ENN EINAFERÐ BRÝTUR UPP ÚR NÝGGJUM. HESUFERÐ VIÐ UPPBOSSØLU.**

Og soleiðis sum AA-liðið spælir, er tað bara heilt hóskandi, at tað er list, ið er á uppboði. Málningalist.

Vit tosa ein málningur eftir Lív Arge, sum við árunum má metast etableraður hoyvíkingur at vera. Maðurin hevur upptøkur av AA-dystum um hendi, og er tað eitt nú elsti sonurin, maðurin við hárinum:), upptøkurnar savna seg um.

H71-stuðlar hava útvegað sær málningin bíliga, og er hetta ein av mongum royndum at savna pengar inn til stórdrivna ungdómsarbeiðið í H71.




Málningurin verður at síggja í Hoyvíkshøllini til heimadystir hjá AA-liðnum. Minsta boð er **3500,-** krónur. Øll boð eru bindandi og navnleys.

Tað ber til at bjóða upp á málningin hjá Lív Arge til og við ein tíma eftir síðsta dyst hjá AA í hesum kappingarári. Hesin dystur er ímóti StÍF hin **4. apríl 2015**, so spennandi verður at síggja, hvussu boðini fara at styðja seg upp.

Vit vóna so tað besta, og boð kunnu latast Helenu á **507751**, Onnu á **598129** og Duritu á **792209**.

**Góða uppboðssølu,**
*H71-stuðlar*






TÁ RÆTT SKAL VERA RÆTT



ADVOKATSKRIVSTOVAN
Halgir Winther Poulsen, adv.
Fríða Patursson, adv.
Óla Jákup Kristoffersen, adv.
Christian Andreasen, adv.
Niels Winther Poulsen, adv.
Jógvan E. Winther Poulsen, adv.
Eyðbjørn Larsen, adv.
Birita S. Samuelsen, adv.

FRÚUTRØÐ 4 · POSTBOKS 6 · FO-110 TÓRSHAVN
TELEFON: (298) 35 33 35 · TELEFAX: (298) 35 33 36 · WWW.JURA.FO

SENDISTOVAN







# h71 klæðini 2014/15



H71 INTERSPORT Thomas Dam ítróttur adidas


Vælkomin inn á
gólvið hjá okkum
... her finnur tú
altíð okkurt!
pf Skálabúðin
DR. JACOBSENSGØTA · TEL. 315 315


Matstovur keypa gass
og køksútbúnað
frá
p/f Sveisingahandilin
Mykinesgota 8 · FO-100 Tórshavn · Tel 311909


SKORA
VIÐ SISU
SISU
Föroya Bjór

FAROE SHIP




SPEKT løggildir grannskoðarar Spf. ·Staravegur 17
Postsmoga 3258 · 110 Tórshavn ·Tel 34 34 34
Faks 34 34 35 · spekt@spekt.fo · www.spekt.fo

SPEKT | løggildir grannskoðarar

Gullpakkin við keypi av nýggjum bili

# Við Gullpakkanum vinnur tú hvørja ferð

**Tá tú keypir nýggjan bil frá Auto Service, fylgir Gullpakkin við, sum ger at tú sleppur undan at hugsa um útreiðslur til viðlíkahald og eftirlit av bilinum næstu trý árini.**



*Heðin Weihe, verkstaðsleiðari*

Visti tú av, at tú eigur, sambært framleiðaranum av bilinum, í minsta lagi einaferð um árið til eftirlit við bilinum fyri at varveita garantiið ?

Somuleiðis mást tú skifta olju í mun til, hvussu nógv tú koyrir, perur fara, sprinklaraveska skal fyllast á so hvørt, og so alt annað, so sum bremsur, útstoyt og stoytdoy-varar kunnu fara.

Alt hetta kann gerast til heilt fitt av peningi. Men við Gullpakkanum, sum fylgir við, fært tú alt hetta fyri einki..! Ja, í veruleikanum fært tú ein mekanikara við eykalutum í 3 ár ella til tú hevur koyrt 90.000 km, við í prísinum, tá tú keypir nýggjan bil frá okkum.

Vælkomin til eitt gott bilakeyp.

**Í Gullpakkanum fært tú:**

- Eftirliti og viðlíkahald av bilinum og harafturat allar neyðugar umvælingar
- Arbeiðsløn, eykalutir sum t.d. perur, viskarabløð og neyðugar veskur og viðlíkahalds- og umvælingararbeiði.
- Tað vil siga: **Ongar viðlíkahalds-útreiðslur komandi trý árini!**

Sí treytir á www.autoservice.fo

Undir Krákugjógv 19 - Postboks 3168 - 100 Tórshavn - Tel 34 54 00 - as@autoserice.fo

Auto Service
www.autoservice.fo

BYGMA
BALSLEV

samskip
Saman røkka vit málinum

yviri við Strond 23 – Postbox 3255 – Tel. 30 88 00 – Fax. 30 88 01 – www.samskip.com



# TEY SVØRTU TØLINI

## DYSTARYVIRLIT HJÁ H71 Í ATLANTIC AIRWAYS DEILDINI

| Dato | Heimalið | Útilið | Úrslit |
|---|---|---|---|
| 28.09.2014 | H71 | Neistin | 24-27 |
| 08.10.2014 | VÍF | H71 | 25-22 |
| 11.10.2014 | H71 | Kyndil | 19-18 |
| 19.10.2014 | KÍF | H71 | 19-23 |
| 25.10.2014 | H71 | T. Klaksvík | 33-12 |
| 02.11.2014 | StÍF | H71 | 20-24 |
| 06.11.2014 | Neistin | H71 | 18-30 |
| 16.11.2014 | H71 | VÍF | |
| 19.11.2014 | Kyndil | H71 | |
| 30.11.2014 | H71 | KÍF | |
| 05.12.2014 | T. Klaksvík | H71 | |
| 13.12.2014 | H71 | StÍF | |
| 20.12.2014 | H71 | Neistin | |
| 01.02.2015 | VÍF | H71 | |
| 15.02.2015 | H71 | Kyndil | |
| 18.02.2015 | KÍF | H71 | |
| 25.02.2015 | H71 | T. Klaksvík | |
| 28.02.2015 | T. Klaksvík | VÍF | |
| 01.03.2015 | StÍF | H71 | |
| 01.03.2015 | KÍF | Kyndil | |
| 07.03.2015 | T. Klaksvík | Kyndil | |
| 08.03.2015 | StÍF | VÍF | |
| 08.03.2015 | Neistin | H71 | |
| 18.03.2015 | H71 | VÍF | |
| 22.03.2015 | Kyndil | H71 | |
| 29.03.2015 | H71 | KÍF | |
| 01.04.2015 | T. Klaksvík | H71 | |
| 04.04.2015 | H71 | StÍF | |

## STØÐAN ATLANTIC AIRWAYS DEILDIN

| Nr. | Lið | Dystir | V.m | T.m. | Munur | Stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | VÍF | 7 | 186 | 152 | 34 | 12 |
| 2 | H71 | 7 | 175 | 139 | 36 | 10 |
| 3 | Kyndil | 7 | 164 | 141 | 23 | 9 |
| 4 | Neistin | 7 | 157 | 176 | -19 | 7 |
| 5 | KÍF | 6 | 147 | 156 | -9 | 4 |
| 6 | StÍF | 7 | 165 | 180 | -15 | 4 |
| 7 | T. Klaksvík | 7 | 158 | 208 | -50 | 2 |



# LIÐINI HESUFERÐ

## H71

**Málmenn:**
1 Ári E. Dam
12 Hanus Kristiansen

**Útileikarar:**
2 Oddur Bech
3 Mark Lauser Marcher
4 Rúni V. Højgaard
6 Djóni V. Højgaard
8 Pætur Thomsen
10 Hallur Biskopstø
11 Hans Kári Hansen
14 Sigmundur Dahl
15 Sigmundur Nolsø
18 Andor Sivertsen
21 Jesper Pedersen
22 Helgi Hoydal
99 Tróndur Arge

*Venjarar:*
**Halgir Dahl Olesen**
**Petur Mittún**
*Málmansvenjari:*
**Jens á Skipagøtu**
*Liðleiðarar:*
**Lars Tornefeldt**
**Rene Dahl Olesen**

## VÍF

**Málmaður**
1 Eli Muller
12 Niclas Simonsen

**Útileikarar**
16 Tóki Seloy
3 Sjúrður Olsen
5 Teis H. Rassmusen
6 Ingi Olsen
7 Agnar Joensen
8 Julian Olsen
9 Áki Egilsnes
10 Andrias Eriksen
11 Jón Muller
14 Heini Hanusarson
17 Mads Eriksen
20 Hanus Christophersen
21 Filip Jojic
22 Sjúrður Nielsen

*Bonkur:*
Michael Eriksson
Jákup Durhuus
Dejan Lacok
Jóngerð Nielsen

**Ítróttarfelagið Hoyvík H71**
Hoyvíkshøllin, Postsmoga 1067
188 Hoyvík · www.h71.fo

**NEVND**
Sunneva Jakobsen, forkvinna
231115, sunneva@liv.fo

Gunn Ellefsen, næstforkvinna
593040, ge@lawfirm.fo

Agga Niclasen, 508689
h71faldarin@gmail.com

Anna Dam, 519082
ad@lawfirm.fo

Rene Dahl Olesen, 235930
renedahlolesen@gmail.com

Emy Sólvitsdóttir, 513769
emys@olivant.fo

Bergtóra Høgnadóttir, 286011
bergtorajoensen@gmail.com

Janet Fríða Johannesen, 212211
jjoh@olivant.fo

**ÁBYRGD AV FALDARA**
Agga Niclasen, 508689
h71faldarin@gmail.com

**ÁBYRGD AV HEIMASÍÐU**
Agga Niclasen, 508689
h71faldarin@gmail.com

**SNIÐ, UMBRÓTING, PRENT OG LIÐUGTGERÐ**
Pf. Føroyaprent, www.foroyaprent.fo
– svanamerktur prentlutur 541 705

**MYNDIR**
Jan Egil Kristiansen, 26 22 40

**ÚTGEVARI**
H71

»GOTT ER AT HAVA
GÓÐAN Í RÁÐUM«



ADVOKATFELAGIÐ VIÐ STROND 4

YVIRI VIÐ STROND 4 · TEL 203040 · FAX 203041 · P.O. BOX 359
FO-110 TÓRSHAVN · FAROE ISLANDS
LAWFIRM@LAWFIRM.FO
WWW.LAWFIRM.FO

JÓGVAN PÁLL LASSEN · PETUR EVEN DJURHUUS
JÓGVAN E. ELLEFSEN · ANNA DAM · INGI HØJGAARD
GUNN ELLEFSEN · MIMI STEINTÓRSDÓTTIR
JULIANNA KLETT · JOHAN J. LAMHAUGE